# Trolararnir fækka

Fyri tjúgu árum síðani vóru 19 trolarar skrásettir í níggju bygdum á Eysturlandinum í Íslandi. Í dag eru bara fimm trolarar eftir, og teir eru skrásettir í fýra ymsum bygdum. Trolararnir høvdu sera stóran týdning fyri virksemið í bygdunum, og tað hevur broytt arbeiðs- og vinnumynstrið nógv, at teir eru fækkaðir so nógv í tali, skrivar Vísir. Ein orsøk til gongdina er, at menn eru farnir í land at arbeiða, tí eftirspurningurin eftir fólki er stórur.



bjóða. Sjálv fiskivinnan er eitt breitt øki, vit hava góðar førleikar, men eisini allar tænastur hesum viðvíkjandi. Vit hava fyritøkur í byggivinnuni, KT, ráðgeving o.s.fr. Skipanir og tænastur eru áhugaverdar í arbeiðnum at byggja landið upp millum heimsins fremstu. Í 2014 verður heimsmeistarakappingin í fótbólti har. Avbjóðingin hjá føroysku vinnuni kundi verið at koma á henda markna áðrenn 2014, og samstundis lagt seg eftir at fáa fleiri uppgávur í samband við HM endaspælið.

Føroyar hava søguliga útflutt nógvan fisk til Brasil og áttu kanska veruliga at umhugsað at fingið fatur á hesum marknaðinum aftur.

### OL í London

Longu í 2012 verða Olympisku Leikirnir í London. London verður ofta nevndur sum ein býur vit áttu at brúkt orku uppá at selja til. Í hesum sambandi er nógv sum skal gerast, fyrireikast og seljast. Eg eri ikki tann rætti at meta um hvørji øki og hvørjar fyritøkur hava førleikar og styrki at liggja framvið, men verður einki gjørt fær eingin nakað burturúr. Eins og við heimsmeistarakappingini í Brasil, ræður tað eisini um at vera við í tí meldrinum, sum er til eina slíka kapping, og royna at sleppa fram at m.a. við sunnum matvørum. Vit kundu. sett okkum sum mál at veita sunna fiskafastfood til tey vitjandi.



*London er vertur fyri Olympisku Leikunum í 2012*



*Kanska heimsins vakrasti stórbýru Rio de Janeiro fer helst at verða ein av HM býunum*

# Inni keypir Sethúsasøluna




*Hannelena Mittún, sum átti Sethúsasøluna, verður nýggjur stjóri hjá P/F Inni eftir samanleggingina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Húsameklarafelagið P/F Inni hevur styrkt støðu sína á føroyska marknaðinum við at keypa Sethúsasøluna Sp/f**

SETHÚSASØLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Kappingin á føroyska bústaðamarknaðinum er herd, og tí hevur Føroya størsti húsameklari, P/F Inni, gjørt av at styrkja støðu sína á marknaðinum við einum strategiskum uppkeypi.

Tað sigur Marner Jacobsen, nevndarformaður í P/F Inni, í sambandi við, at P/F Inni við virknaði frá í dag hevur keypt Sethúsasøluna Sp/f.

Við at leggja fyritøkurnar saman fáast synergiir burturúr, ið bæði eru til fyrimuns fyri kundarnar og fyritøkurnar báðar. Bæði Inni og Sethúsasølan hava virksemi kring alt landið. Inni hevur søluskrivstovur í Havn, Saltangará og Klaksvík, og Sethúsasølan hevur søluskrivstovu í Havn.

Í sambandi við keypið av Sethúsasøluni er avtalað, at stjórin í Sethúsasøluni, Hannelena Mittún, heldur fram sum stjóri í P/F Inni. Hon hevur verið eigari og stjóri í Sethúsasøluni síðani 2004.

Jónsvein Mortensen, sum hevur verið stjóri í Inni síðani stovnanina í 1998, heldur fram sum ein av berandi kreftunum í felagnum.

Inni varð stovnað í 1998 og hevur ment seg væl øll árini undir leiðslu av Jónsvein Mortensen. Í dag starvast 6 fólk í Inni, sum hevur ein munandi part av føroyska bústaðamarknaðinum.

Sethúsasølan, sum seinastu tíðina hevur hildið til í gomlu bakarísøluni hjá Frants Restroffs í Tórgøtu, letur í næstum aftur, og virksemið og Hannelena Mittún flyta niðan í hølini hjá P/F Inni í Niels Finsensgøtu.

# Vilja menna virksemi hjá ferðavinnubátum

**Við endamálinum at menna, marknaðarføra og umboða ferðavinnubátarnar, er Felagið Ferðavinnubátar stovnað**

FERÐAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sunnudagin 21. oktober varð Felagið Ferðavinnubátar stovnað. Felagið er fyri bátar ella feløg, sum bjóða út fiski og sigli túrar.

Leingi hevur verði tosað um at stovnað eitt slíkt felag, og ein fundur varð hildin í Vestmanna í maimánaði og avgjørt varð at stovna felagið. Hetta bleiv so gjørt 21. oktober, tá stovnandi aðalfundur varð hildin.

Nevnd varð vald á fundinum, og í henni sita Petur Simonsen, formaður, Magni Blástein, Magni Garðalið og Hávarður Enni.

Nevndin er í ferð við at leggja eina arbeiðsskrá tilrættis, og tiltøk fara at verða fyriskipað í vetur, ið viðkoma ferðavinnubátum. Umframt tað arbeiður nevndin við at gera marknaðarføringstiltøk uttanlands. Felagið kemur at arbeiða tætt saman við Samvit, við menning av hesum spennandi partinum ferðavinnuni.

Endamálið við felagnum er m.a. at menna, marknaðarføra og umboða hesa vinnu. Millum fyrstu tiltøk felagsins er at skapa samstarv viðmyndugleikar, so sum Skipaeftirlitið, Samvit, tryggingarfeløg og heilsølur.

– Fleiri bátar eru longu blivnir limir, og væntandi leggjast fleiri afturat komandi tíðina. Øll áhugaði er vælkomin at seta seg í samband viðfelagið, sigur Petur Simonsen, formaður felagsins.